Fernandez í fokus

Heini Fernandez var óhepni høvuðspersónurin í eini hending, sum hevur fingið umrøðu í bæði Se & Hør og í Ekstra-Blaðnum.

Undir eini veitslu, sum Ekstra-Blaðið og danska spælarasambandið, skipaðu fyri tann 9. desember, var hann heldur áhaldsin, tá hann og fýra aðrir leikarar skuldu fara heim.

Teir sótu í bilinum hjá Mohammed Zidan, sum ætlandi skuldi koyra bilin, men tá hesin fór úr bilinum at kanna eitthvørt, gjørdi Fernandez skjótt av. Hann setti seg á forsetrið og setti bilin í bakgear, men ólukkutíð stóð ein annar bilur skamt ífrá, og endin varð ein samanstoytur.

Vitnir, sum sóu tilbuðin, meldaðu alt fyri eitt, og stutt eftir kom løgreglan á staðið, har Fernandez varð handtikin fyri brotið, og nú kann hann so rokna við at skula ein túr í rættin, har dómarin eftir øllum at døma

-jm

TB vann á Drátti

Útsetti dysturin millum TB og Drátt í meistaradeildini hjá kvinnum, varð leiktur annan jóladag.

Úrslitið av dystinum gjørdist ein 3-1 sigur til TB, sum við hesum hevur lagt seg undir liðina á Mjølni í oddinum, nú grundspælið er liðugt. Bæði hava tey 16 stig. KÍF er á triðja plássinum við 10 stigum.

Við sigrinum á Drátti 2. jóladag, eru tvørakvinnur á odda í meistaradeildini, saman við kvinnunum úr Mjølni

-jm

Tveir KÍ-leikarar skrivaðu sáttmála

Mánakvøldið fyri jól fekk KÍ pappír upp á Atla Danielsen og Ova Nysted

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Mánakvøldið var eitt av teimum heilt hugaligu hjá teimum mongu klaksvíkingunum, sum hava ein brennandi áhuga fyri KÍ.

Undan kvøldinum hevði KÍ boðað frá, at talan var um eina lítla samkomu, nú Jákup Mikkelsen skuldi venda heim til felagið, og eisini var løtan ogna Annfinni Danielsen, sum er ungdómsvenjari í felagnum, og sum júst hevur verið í Danmark, har hann hevur fingið skurðviðgerð.

Men tað mundi vera ein illa fjald loyna, at KÍ eisini hevði onnur geramál á skránni hetta kvøldið. Fyrst og fremst var tað venjarin fyri komandi árið, sum varð almannakunngjørdur, og ikki óvæntað gjørdist tað Ove Flindt Bjerg, soleiðis sum vit skrivaðu í seinasta blaðnum fyri jól.

Hartil kundi KÍ á fundinum boða frá, at felagið nú hevur fingið sáttmála í lag við tveir av leikarunum, sum felagið hevur bygt liðið kring seinnu árini. Ovi Nysted og Atli Danielsen mugu báðir metast sum rimmarfastir í KÍ-verjuni, og tað verða teir eisini eftir øllum at døma komandi árið. Atli setti sítt navn á nýggjan eitt-ára sáttmála, og Ovi hevur givið KÍ pappír upp tey trý komandi árini.

Føroyar vunnu bólkin

Føroyska manslandsliðið vann sín undankappingarbólk í Skotlandi um vikuskiftið

FLOGBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Manslandsliðið í flogbólti vann undankappingarbólkin í Skotlandi um vikuskiftið

Føroyar vunnu allar tríggjar dystirnar, tá EM-undankappingin í mansflogbólti var á skránni um vikuskiftið.

Fyrsti dysturin var fríggjadagin móti Íslandi, sum undan kappingini varð mett sum eitt hitt truplasta mótstøðuliðið hjá Føroyum. Tað eru fleiri ár síðani, at Føroyar seinast vunnu landsdyst á Íslandi, men hesaferð var eingin sum helst ivi um úrslitið. Tó at talan var um trý tøtt sett, so vóru føroyingar stinnari í hvørjum av hesum, og so var kósin sett móti oddasessinum. Skotland megnaði heldur ikki at forða føroyingunum í hesum, tá talan aftur gjørdist um 3-0 sigur, og soleiðis skuldu Føroyar bert vinna eitt sett móti Luksemburg til tess at tryggja oddasessin. Fyrsta settið var eisini tikið í stórum stíli, men síðani mutaði Luksemburg tó væl ímóti, men ending gjørdist, at Føroyar vunnu dystin 3-2.

Sum eyka krydd hjá føroyska liðnum kom umframt oddasessin, at Rúni Weihe varð kosin besti leikari og besti álopsleikarin í Skotlandi, umframt at Ragnar í Haraldsstovu Petersen varð kosin besti blokkurin í kappingini.

Hendan greinin skuldi upprunaliga verið við í blaðnum fyri jól, men orsakað av einum mistaki kom hon tá ikki við í blaðið. Vit biðja lesaran halda okkum tilgoðar. (blðm.)

Úrslitini:
Føroyar-Íslandi 3-0 (25-22, 26-24, 25-20)
Føroyar-Skotland 3-0 (25-20, 25-23, 25-18)
Føroyar-Luksemburg 3-2 (25-13, 19-25, 25-20, 19-25, 15-11)

Rútmisk kapping

Seinast í januar mánaði fer Havnar Fimleikafelag at skipa fyri rútmukapping

FIMLEIKUR
tíðindaskriv

Øll úr 1. flokki og eldri kunnu luttaka - treytað av, at 4-5 luttakarar eru í liðinum. Harafturat kunnu í mesta lagi 2 í liðinum verða við í stórkappingarfimleiki.

Kappingin verður býtt í 4 bólkar: 1. til og við 2. flokkur, 3. til og við 4. flokkur, 5. til og við 6. flokkur og 7. flokkur og eldri. Eru luttakarar úr fleiri bólkum á sama liðið, tekur liðið lut í kappingini, har elsti fimleikarin í bólkinum er flokkaður.

Liðini seta sjálv saman fimleikaseriu og skulu hava í huga, at dømt verður eftir: Kroppsburði, hvussu tryggar genturnar eru í venjingunum, samsvar millum tónleik og venjingar og hvussu genturnar fylgjast (gera í takt).

Tónleikinum stendur liðið eisini til at finna - og eiga fimleikararnir at hava í huga, um tónleikurin hóskar til seriuna.

Tilmeldingarseðlarnir skulu vera inni sum skjótast og kappingin verður sunnudagin 25. jan. 2004 í høllini á Stórheyggi. Kappingin byrjar kl. 14.00 við bólki 1. Fyrst við innleiðandi umførum í øllum bólkum, síðani eini finalu í hvørjum bólki.

Nr. 1, 2 og 3 í hvørjum bólki fáa heiðursmerki og heiðursprógv. Øll luttakandi fáa heiðursbrævi. Seinasta freist fyri tilmeldan er leygardagin, 17. januar.

Heðin spælir nú í HB

Um jólini fekk HB-hópurin tilgongd av enn einum leikara

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Tollaksmessudag stóð greitt, at HB hevur ognað sær enn ein leikara til frammanundan sterka leikarahópin komandi ár

Hesa ferð var tað Heðin á Lakjuni, sum setti sína undirskrift á pappírið, og einki er at ivast í, at tey í HB eru fegin um nýggja leikaran. Seinnu árini hevur Heðin verið ein av avgjørt vandamestu leikarunum í føroysku fótbóltskappingini, og eitt nú mundi hann vera ein hin mest týðandi leikarin á B36-liðnum, sum í 2001 vann greipuna. í 2002 var hann aftur í KÍ, men eitt beinbrot hetta árið gjørdi sítt til, at tað kappingarárið ikki gjørdist tað besta hjá klaksvíkingunum. Í ár var hann aftur í B36, og tó at tað so ikki gjørdist til nakra endurtøku av greipuni, so var hann fastur fúsus á liðnum, sum vann Løgmanssteypið og silvur í landskappingini, og tí er einki at siga til, um tey í B36 iðra seg um, at hava mist enn ein leikara til grannarnar úr HB.

Steinfinnur Mittelstein, formaður í HB, segði eftir skiftið, at hann nú metti, at felagið var um at hava allan leikarahópin kláran til komandi árið.

– Tað er í øllum førum soleiðis, at vit ikki longur beinleiðis eru eftir nøkrum ávísum leikara. Hinvegin fylgja vit sjálvandi við, hvat rørir seg í ymsu feløgunum kring landið, segði hann í telefonini tollaksmessudag.

Heðin á Lakjuni er næsti spælarin, sum hevur nýtt vetrarsteðgin til at skifta úr B36 í HB

TM Junior
Barnaklæðir
er til sølu
um hóskandi boð fæst
TM Junior
Dr. Jacobsensgøta 15
Boks 51
110 Tórshavn
Tel. 31 10 99
Fartel. 21 76 67

Gjørt verður kunnugt, at allar skrivstovur hjá SEV eru stongdar frá tollaksmessudegi kl. 16.00 til 5. januar 2004 kl. 08.00 og at øll linjuarbeiðir o.a. sum tolir at bíða, verður steðgað í sama tíðarskeiðið.

Vit hava vakt alt døgnið. Til ber at fáa fatur á vaktini á **tlf. nr. 346800** í nevnda tíðarskeiði.

Vaktin tekur sær bert av viðurskiftum, sum ikki tola at bíða, sum t.d. streymslit.

Tórshavn, tann 22. desember 2003

Elfelagið SEV

Götu Kommuna

Gøtu bygdarráð

hevur ásett føstu almennu fundirnar at vera niðanfyrinevndu kvøld kl. 19.00.

Mánakvøldið 26. januar	Týskvøldið 22. juni
Mánakvøldið 1. mars	Mánakvøldið 6. sept.
Mánakvøldið 29. mars	Mánakvøldið 27. sept.
Mánakvøldið 26. apríl	Mánakvøldið 25. okt.
Mánakvøldið 24. mai	Mánakvøldið 29. nov.

Fundirnir verða hildnir í fundarhølinum á kommunuskrivstovuni.

Eykafundir ella broytingar til omanfyrinevndu, verða lýstir í svørtutalu við Gøtugjógv.

Veðrið Bilar Lýsingar Tíðindi Viðmerkingar Ítróttur Nøvn Skráir

Sosialurin Sosialurin Sosialurin -tað loysir seg

Tvingsilssøla

Fríggjadagin 16. januar 2004, kl. 9.15 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina **matr. nr. 240 Sumba (Lopra),** (AS nr. AS 2-29/2003).

Talan er um eini sethús 121 kvm. í kjallara- og stovuhædd við lágari reising. Sethúsini eru bygd í 1972.

Grundin er stoypt upp, og eru húsini annars gjørd úr og klødd við timbri. Takið er út eternitlíknandi plátum.

Húsini eru annars innrættaði soleiðis: **Í miðhæddini:** Er ein gangur ígjøgnum øll húsini, garderoba og tuflugangur, stova, køkur, fýra sovikømur, eitt baðirúm við wc-kummu og hondvaski, umframt eitt baðirúm við brúsu og baðikari, wc-kummu og hondvaski.

Í kjallarahæddini: trý rúm og ein hjallur. Trappuuppgongd til miðhæddina. Gólvið er stoypt í støðum.

Húsini sýnast at vera í rímuligum standi.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Inga Højgaard, advokati, Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tel. 311260, (sak nr. 44655.01),** sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

Føroya Fútarættur
hin 23.12.2003

Starvsfólk til Sølu- og Marknaðardeildina

Virksemið hjá Atlantic Airways veksur støðugt. Hetta hevur við sær, at meira er at tríva í á Sølu- og Marknaðardeildini. Tí sóknast Atlantic Airways eftir einum dugnaligum starvsfólki til hesa deildina.

Nýggja starvsfólkið fær ábyrgdina av beinleiðis telefonsølu, v.m.

Starvsfólkið skal duga at fáast við marknaðarføring og sølu. Kravt verður eisini, at starvsfólkið er vant at arbeiða við øllum vanligum telduforritum, og at tað hevur góðan málkunnleika. Kunnleiki til Amadeus er ein fyrimunur. Saman um tikið skal starvsfólkið hava góð skapandi evnir og duga at loysa ymiskar og fjølbroyttar uppgávur.

Hevur tú fingið áhuga fyri hesum spennandi starvi, kanst tú senda umsókn við prógvum og viðmælum. Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 12. januar 2004. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Lønin verður ásett sambært avtalu okkara millum.

Tú kanst fáa fleiri upplýsingar um starvið við at venda tær til Kent Christensen á telefon 34 10 40.

Atlantic Airways
Sølu- og Marknaðardeildin
FO-380 Sørvágur

ATLANTIC AIRWAYS
FO-380 Sørvágur · Tel: 34 10 40 · Faks 34 10 01
www.atlantic.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Barnaansingin
Barnaansingin í Tórshavnar kommunu umfatar dagrøktarskipanina, 29 dagstovnar og 10 frítíðarskúlar við tilsamans 1.700 børnum í ansing.

Dagstovnurin við Løgmannabreyt
Á stovninum eru tvær vøggustovur við 12 børnum í hvørjari, og tvær barnagarðsstovur við 18 børnum í hvørjari. Trý starvsfólk eru í hvørjari stovu.

www.torshavn.fo

Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

Dagstovnin við Løgmannabreyt eftir:
- trimum pedagogum 35-40 tímar um vikuna í vøggustovu.
- einum vaskifólki 10 tímar um vikuna.

Størvini verða sett 15. januar 2004 ella eftir nærri avtalu.
Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 12. januar 2004.

Leiðari Sofía Nattestad, tlf. 319105 ella tlf. 219105
Løgmannabreyt
FO-188 Hoyvík

Vit ynskja
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

Setanarviðurskifti
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meiri fæst at vita
um størvini við at venda sær til stovnsleiðaran ella til Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.